gult6 cyan6 magenta6 svart6

Landsstýrið loypt ræðslu á lærarar

Nú skúlarnir kring landið í hesi vikuni hava fingið endalig boð um, hvussu nógvir tímar, teir fáa komandi skúlaár, hevur tað rættiliga loypt ræðslu á skúlaleiðslur og lærarar. Hetta er ein vanlukku fyri skúlan, sigur formaðurin í Føroya Lærarafelag

SKÚLASKAPUR
Áki Bertholdsen

Nú hava skúlarnir kring landið loksins fingið endalig boð um, hvussu nógvar tímar, teir fáa næsta skúlaár. Hetta er ein vanlukka og hevur rættiliga loypt ræðslu á skúlaleiðslur og lærarar, tí tað er ómøguligt at fáa tað at bera til, sigur formaðurin í Lærarafelagnum. Myndin er tilvildarlig

– Hetta er rætt og slætt ein vanlukka.

Elsa Birgitta Petersen, formaður í Føroya Lærarafelag, sigur, at hon kann ikki koma til aðra niðurstøðu, nú skúlarnir kring landið í hesi vikuni hava fingið endalig boð frá Mentamálastýrinum um, hvussu nógvir tímar teir fáa komandi skúlaár.

Men tíverri vóru tey endaligu boðini bara ein staðfesting av tí, sum skúlarnir munnliga høvdu fingið at vita frammanundan, nevniliga, at skúlarnir fáa alt, alt ov fáar tímar.

Boðini úr Mentamálastýrinum hava elvt til telefonstorm á Lærarafelagið frá ørkymlaðum og vónleysum skúlaleiðslum, sum ikki vita síni livandi ráð, hvussu tær skulu kunna fáa gjørt tímatalvu við teimum tímum, tey hava fingið tillutað og samstundis lúka tey lógarkrøv, sum fólkaskúlalógin áleggur skúlunum.

–Hetta hevur rættiliga loypt ræðslu á bæði skúlaleiðslur og lærarar, tí tað letur seg rætt og slætt ikki gera at halda lógir og avtalur við tí tímatali, sum skúlarnir hava fingið sigur Elsa Birgitta Petersen.

Tvingað at bróta lógina

Hon veit ikki rættiliga, hvussu nógvir tímar mangla í, fyri at skúlarnir kunnu fáa lagt tímatalvuna næsta ár, og samstundis lúka tey tær treytir, sum nýggja fólkaskúlalógin áleggur teimum.

– Men tað er greitt, at tímarnir eru alt, alt ov fáir. Hon sigur, at tað sum nú hendir, er stutt og greitt, at landsstýrið tvingar skúlarnar til at bróta fólkaskúlalógina, tí við tí lítla tímatalið, sum teir hava fingið, verða teir noyddir at leggja eina tímatalvu, sum beinleiðis er í stríð við lógina.

Sum heild fáa skúlarnir tímatal, bæði eftir, hvussu nógvir næmingar og, hvussu nógvir flokkar eru í hvørjum skúla.

Harafturat fáa teir minstu skúlarnir nakrar tímar eyka. Hesin útrokningarhátturin ger, at teir skúlarnir, sum hava eina millumstødd, eitt nú Vágur, Tvøroyri, Vestmanna og Giljanes, eru út av lagi illa fyri við tímum. Men eisini teir smæstu og teir stóru skúlarnir hava ovurhonds stórar trupulleikar.

Nyttar onki

Landsstýrismaðurin í skúlamálum, hevur meiri enn einaferð sagt, at hann skilir ikki rættiliga, hví trupulleikin skal vera serliga stórur í ár, eitt nú í Vestmanna, tí skúlin hevur fingið líka nógvar tímar næsta ár, sum hann hevur í ár.

– Hatta er høpisleys tala. Tað nyttar ikki at tosa um tímar, uttan at hugsa um allar tær eyka skyldur, sum skúlin fær næsta skúlaár, sum hann ikki hevur havt í hesum skúlaárinum.

Tað, sum formaðurin í skúlamálum sipar til, er, at í ár verður ein partur av nýggju fólkaskúlalógini settur í verk. Somuleiðis sipar hon til semjuna, sum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið gjørdu síðsta vár, og sum førir øktar útreiðslur við sær komandi skúlaár.

– Men tað er ikki hent og tí er skúlin komin í hesa vanlukkustøðu, sum hann nú er komin í.

– Tað sigur seg sjálvt, at tað kann gera tað sama, um tímatalið næsta skúlaár verður tað sama sum hetta skúlaárið, ella um játtanin til fólkaskúlan er hækkað eitt sindur, tá ið tørvurin og útreiðslurnar eru hækkaðar nógv meiri, sigur formaðurin í Lærarafelagnum.

Hon sigur, at eitt nú hevur Mentamálastýrið ikki lagt upp fyri, at lærugreinin »handverk og list« krevur nógv fleiri lærarar og sostatt eisini nógv fleiri tímar, tí skúlastovurnar til lærugreinina eru smáar og sostatt eisini neyðugt at hava smærri bólkar.

– Tá ið vit gjørdu semjuna við landsstýrið seinasta vár, varð eisini avtalað, at tímarnar til skúlabókasøvn skulu latast skúlunum umframt; Men kortini er tað nú endað við, at teir skulu taka samt burturav teimum tímum, sum skúlarnir hava fingið.

Elsa Birgitta Petersen sigur, at hetta eru alt mál, sum Lærarafelagið arbeiðir við í eini vón at fáa bøtt um støðuna.

Verða tvingað at bróta lógina

Føroya Lærarafelag fer nú at biðja skúlaleiðslur kring landið gera eina fullkomna tímatalvu fyri at vita, hvussu hon hevði sæð út, um fólkaskúlalógin og sáttmálin ímillum Lærararafelagið og Fíggjarmálastýrið, skal haldast

SKÚLASKAPUR
Áki Bertholdsen

– Frymilin, sum verður brúktur at rokna tímatalið til skúlarnar kring landið út eftir, tvingar skúlarnar til at bróta lógina og tí er hann ólógligur, sigur Formaðurin í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta Petersen. Hon sigur, at hetta er eitt mál, sum Lærarafelagið fer at arbeiða við

Útrokningargrundarlagið, sum Mentamálastýrið roknar tímatalið til skúlarnar kring landið út eftir, er ólógligt.

Tað heldur Føroya Lærarafelag.

Felagið hevur nú biðið leiðslurnar á øllum skúlunum í Føroyum um at gera støðuna upp og at senda felagnum eina veruliga tímatalvu fyri komandi ár, fyri at vita, hvussu hon hevði sæð út, um allar lógir og allir sáttmálar skulu haldast.

Hon vísir á, at frymilin, sum enn verður brúktur at rokna tímatalið til hvønn skúla út eftir, kom í gildið í teimum ringastu kreppuárunum fyrst í nítiárunum.

– Tá ið landið er í slíkari kreppu, sum tað var í, kann tað góðtakast undantaksstøður verða settar í verk í avmarkað tíðarskeið.

– Men frymilin varð ongantíð settur úr gildið aftur og vit kunnu ikki góðtaka at landsstýrið blívur við at tvíhalda um eina kreppuloysn, hóast tíðirnar eru nógv batnaðar.

Formaðurin í Lærarafelagnum sigur, at soleiðis, sum frymilin nú er, fáa skúlarnir ikki nóg mikið av tímum til at teir kunnu halda ásetingarnar í fólkaskúlalógini og teimum ásetingum, sum eru í sáttmálanum ímillum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið.

– Við at brúka hendan frymilin, tvingar Mentamálastýrið skúlaleiðslur og lærarar at bróta lógina. Tí halda vit, at frymilin í sær sjálvum er ólógligur.

Orsøkin til, at Lærarafelagið nú hevur biðið skúlarnar leggja eina veruliga tímatalvu, er fyri at vita, hvussu myndin sær út, um hon verður vend á høvdið.

– Tað rætta hevði verið, um skúlarnir løgdu eina tímatalvu so at treytirnar fólkaskúlalógini og sáttmálanum millum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið verða hildnar, og so fekk skúlin tímar eftir tí. Tí hevur Lærarafelagið nú biðið skúlaleiðslurnar um at leggja eina tímatalvu sambært fólkaskúlalógini og sáttmálanum millum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið, fyri at fáa eina fullgóða mynd av, hvussu tímatalvan eigur at síggja út.

Skúlin nógv dýrari

Elsa Birgitta Petersen sigur, at tað eru tvær orsøkir til at fólkaskúlin verður so nógv dýrari komandi skúlaár, enn hann er í ár.

– Orsøkin er partvís tann, at partar av fólkaskúlalógini verða settir í verk nú og tað kostar. Somuleiðis koma partar av sáttmálanum, sum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið gjørdu tíðliga seinasta summar, eisini í gildið nú.

Hon sigur, at varð landsstýrið ikki sinnað at halda sáttmálan, átti tað ikki at havt góðkent hann.

Hon átalar eisini, at meirilutin í Løgtinginum hevur samtykt eina nýggja fólkaskúlalóg, sum áleggur skúlanum nógvar skyldur og uppgávur afturat, uttan at hesin sami meiriluti samstundis er sinnaður at játta peningin sum krevst fyri at halda lógina.

– Fólkaskúlalógin er frálik, men hon nyttar hvørki eitt ella annað, um Løgtingið ikki samstundis er sinnað at játtað tað, hon kostar.

– Vit hava eisini boðað frá, at er ikki politiskur vilji til at hava tað virksemið í skúlanum, sum lógin ásetur, so er at broyta lógina, tí ongin kann liva við at lógin beinleiðis verður brotin.

Hon sigur, at í ár eru 186 milliónir játtaðar til lønir í fólkaskjúlanum og tað er sjálvsagt nógv tann størsta útreiðslan. Mentamálastýrið hevur nýliga boðað Fíggjarmálastýrinum frá, at skulu fólkaskúlalógin og sáttmálin við Lærarafelagið haldast, fer skúlin at kosta 27 milliónir meiri í 2001, enn hann ger í ár.

gult7 cyan7 magenta7 svart7

Nú skal loysn finnast fyri múrin



Nú skal skerast ígjøgnum í stríðnum um Kirkjubømúrin. Tveir dagar áðrenn hann fór úr mentamálasessinum, setti Tórjørn Jacobsen eina nevnd at gera eina ætlan um, hvussu múrurin skal varðveitast

Tórbjørn Jacobsen hevur sett eina nevnd, ið skal skera ígjøgnum í stríðnum um, hvussu kirkjubømúrurin skal varðveitast. Petur Zachariassen er formaður

KIRKJUBØMÚRURIN
John Johannessen

Nú skal skerast ígjøgnum í stríðnum í málinum um múrin í Kirkjubømúrin.

Hetta hevur Tórbjørn Jacobsen sett sær fyri, og tí setti hann eina nevnd at gera eina ætlan um, hvussu múrurin skal varðveitast, tveir dagar áðrenn hann fór úr sessinum sum landsstýrismaður í mentamálum. Til formann í nevndini valdi Tórbjørn Jacobsen Petur Zachariassen, Sum Mentamálastýrið hevur brúkt í fleiri øðrum tungum málum.

Bert tos

– Vit kunnu staðfesta – bara við at hyggja at múrinum – at tað hevur verið tosað um hann í ártíggjur, í áhundrað, tað einki er hent. Man hevur ikki kunnað loyst upp fyri nøkrum sum helst. Og hesum havi eg so tikið avleiðingarnar av og valt ein mann, sum vit í Mentamálastýrinum hava stóra virðing fyri og stórt álit á, segði Tórbjørn Jacobsen við Sjónvarpið týsdagin.

Tórbjørn Jacobsen hevur álagt nevndini, at hvør loysnin so verður fyri múrin, skal talan vera um eina loysn, ið kann takast burtur aftur, nær tað skal vera, so múrurin sær út, júst sum hann ger í dag.

Diplomatur

Uppgávan hjá Peturi Zachariassen verður í tí stóra at koma til eina niðurstøðu, sum ymsu partarnir í stríðnum um múrin kunnu góðtaka. Tí sær hann í stóran mun sín leiklut sum eitt slag av diplomati.

Petur Zachariassen hevur ikki fakligan kunnleika innan fornfrøði. Men hetta sær hann ikki sum nakran trupulleika. Tí í nevndini sita onnur fólk, ið eru før fyri at veita honum fakliga førleikan, hann hevur brúk fyri.

Fyrsti vágbingur í landsstýrið í dag

Tá Anfinn Kallsberg, løgmaður, í dag setur Óla Holm í starvið sum landsstýrismaður í mentamálum, verður tað fyrstu ferð, at landsstýrismaður býr í Vági

LANDSSTÝRISSESSUR
John Johannessen

Einaferð seinnapartin í dag, hósdagin, fer 56 ára gamli varaskúlastjórin í Vági, Óli Holm, í Tinganes til løgmann at fáa setanarbræv sum landsstýrismaður.

Og samstundis, sum Óli fær heiðurin av at taka við hesum tignaðarliga starvi, fáa vágbingar sín fyrsta landsstýrismann nakrantíð. Tað er nevniliga eingin vágbingur búsitandi í Vági áður útnevndur til landsstýrismann, hóast fleiri landsstýrismenn og enntá ein løgmaður hava verið ættaðir úr Vági.

Hergeir Nielsen, sum nú býr í Vági, var landsstýrismaður í skúlamálum frá 1978 til 1980, men hann var ikki búsitandi í Vági, tá hann varð kosin at verða landsstýrismaður. Hergeir búði heldur ikki í Vági, meðan hann var landsstýrismaður.

Marita Petersen, sum er ættað úr Vági, men býr í Havn, var landsstýriskvinna frá 1991 til 1993, og frá 1993 til 1994 var hon løgmaður.

Kristian Magnussen, sum er ættaður úr Vági, men býr í Havn, var landsstýrismaður frá 1997 til 1998.

Óli Holm tekur við starvinum sum landsstýrismaður, eftir at Tórbjørn Jacobsen fyri knøppum tveimum vikum síðani valdi at leggja frá sær, sum avleiðing av sínum til tíðir óhøviska atburði.

Tosa um val í heyst

Millum politiskar eygleiðarar er slaturin veruliga farin at ganga um, at vit møguliga fáa eitt val í heyst. Løgmaður ætlar sær tó ikki at skriva út val, fyrr enn valskeiðið er av

VAL
John Johannessen

Seiglívaður slatur er farin at ganga um, at val verður útskrivað í heyst. Og enntá er nýggi landsstýrismaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum, Óli Holm, endurgivin fyri at siga, at hann væntar val í heyst.

Eisini veit Sosialurin, at limir í Tjóðveldisflokkinum, sum búgva í Norðoyggjum, herfyri hava fingið bræv frá Tjóðveldisflokkinum við umbøn um fíggjarligan stuðul til eitt løgtingsval, ið stendur fyri durum.

Løgmaður veit tó einki um nakað val í heyst.

– Verður val í heyst, er tað ikki tí, at eg havi útskrivað tað. So má tað vera tí, at meiriluti er fingin fyri tí í løgtinginum, sigur løgmaður.

Tjóðveldisflokkurin avsannar eisini tíðindini. Heini O. Heinesen, formaður í tingbólki Tjóðveldisfloksins, váttar, at hann hevur fingið eitt bræv við umbøn um stuðul til eitt tilstundandi løgtingsval. Men hann sigur seg einki vita um, at Tjóðveldisflokkurin handan leiktjøldini arbeiðir við at fáa løgtingið at samtykkja at val at verða í heyst.

– Men tað kann tó altíð henda, at vit fáa eitt val í heyst. Við hesi gongdini vita vit ikki, hvat hendir, sigur Heini O. Heinesen.

Tað bar ikki til at fáa viðmerking frá Høgna Hoydal, formanni í Tjóðveldisflokkinum, áðrenn blaðið fór í pressuna beint eftir døgurða í gjár.